Óvanliga nógvir leikarar á pallinum

- Tað er harmiligt, at tað hevur verið so drúgvt at bíða eftir kanningini, men nú vóna vit bert, at málið fær ein enda, sigur Helena Dam á Neystabø, eygleiðari í kanningarnevndini

DAGNY JOENSEN

Nógvir leikarar hava verið á pallinum í bankamálinum, og nógvar gitingar hava verið gjørdar. Tað kann t.d. hava verið gjørt, fyri at seta annan partin í ávíst ljós

Tað byrjaði við at Anne Birgitte Lundholdt úr Konservativa flokkinum, í var segði, at hon ikki væntaði at Fíggjareftirlitið og Vinnumálaráðið fóru at standa seg illa í kanningini

Næsta ábendingin í málinum var, at Peter Straarup, sum var ein av smiðunum aftan fyri partabrævaumbytið, varð settur forstjóri í Den Danske Bank

Tá var viðmerkingin, at henda stjórasetanin var tekin um, at Den Danske Bank fór at koma væl frá sínum leikparti í bankamálinum.

Síðani kom fram, at Michael Rekling, skrivari í kanningarnevndini, var inhabilur, og hevði arbeitt fyri Den Danske Bank

At enda komu so tíðindini um, at kanningarnevndin skuldi hava látið Den Danske Bank 1200 loyniligskjøl. Í samráði hósdagin avsannaði Frank Jensen hetta, eftir at hann hevði fingið frágreiðing frá Jørgen Grønborg, kanningarstjóra. Einki hald var í greinini, sum stóð í „Børsen" 1. oktober í ár, varð sagt í politisku búskaparnevndini

Helena Dam á Neystabø, eygleiðari í nevndini, kann ikki gera viðmerkingar til kanningina, men hon noyðist at viðganga, at nógvur ófriður hevur verið um kanningina í seinastuni.

- Vit vilja bert hava kanningina liðna, so bankamálið kann verða viðgjørt og sakarmál reist, áðrenn fyrningarfreistin er úti, sigur hon.

- Tað er heldur ikki óhugsandi, at partarnir stúra fyri úrslitinum av kanningini. Tað er kanska orsøkin til at fleiri - hálvavegna gølur - hava verið frammi, men eg haldi ikki, at vit kunnu illgita nakran, sigur Helena Dam á Neystabø.

- Eg veit bert, hvat eg havi hoyrt og sæð, men eg veit ikki, hvussu kanningarnevndin prioriterar ymsu lutirnar. Sum støðan er í dag, so eigur kanningin at verða gjørd liðug

- Vit eru øll ørkymlað av, at tað hevur tikið so drúgva tíð at fáa enda á kanningini, og til hetta kann sigast, at gølusøgurnar hava seinkað málinum, sigur Helena Dam á Neystabø

Spurd um tað ikki er sannlíkt, at partar í kanningini vilja forða nevndini í at gera arbeiðið liðugt, sigur Helena Dam á Neystabø, at tað er hugsandi at onkur vil taka álitið á kanningarnevndina burtur

- *Er vandi fyri, at kanningarnevndin verður forðað í at gera arbeiðið liðugt?*

- Eg trúgvi at kanningarnevndin hevur sett sær fyri at gera kanningina liðna.

- Um so er, at arbeiðið steðgar upp, skal helst ein lógarbroyting gerast, sum semja skal vera um, bæði í Løgtinginum og á Fólkatingi. Tað er neyvan sannlíkt, sigur Helena Dam á Neystabø

Bretska felagið „Oilsearch" undir spennandi kanningar:

Kortleggja oljulekar eystan fyri Føroyar

Hetta er annað av flogførunum, sum australska felagið World Geoscience brúkti í kanningunum við Føroyar fyri tveimum árum síðani. Mynd jan

Í gjár kom ein heldur óvanligur gestur í Vágarnar. Tað er eitt flogfar av Navahoslagnum við plássi til átta fólk. Tað er bretska fyritøkan „Oilsearch", sum eigur hetta og eitt flogfar afturat, ið bæði verða brúkt í leitingini eftir olju og gassi kring um í heiminum

Nú gongur leiðin so til Føroya. Fyritøkan hevur fingið tillutað kanningarloyvi frá Oljufyrisitingini og er ætlanin komandi 3-4 vikurnar at gera kanningar eystan fyri Føroyar. Talan er um eitt serligt slag av kanningum, sum allar verða gjørdar úr flogfari

Caroleen Moir, sum stendur fyri kanningunum, kom til Føroya í vikuni og hevur hon gjørt neyðugu fyrireikingarnar á landi. Ætlanin er at hava fasta støð í Vágum, meðan arbeitt verður. Hetta er lættast og best fyri tey sigur Caroleen Moir

Seinnapartin í gjár varð so farið at seta upp elektroniska útgerð á flogvøllinum og at gera flogfarið klárt til fyrstu kanningarnar. Arbeitt verður á einum øki eystan fyri Føroyar. Tað nærmasta tey eru landi er 50 kilometrar

Hetta er ikki fyrstu ferð, at fyritøkur gera kanningar úr flogfari. Australska felagið World Geoscience hevur verið her tvey summar á rað og gjørt kanningar. Úrslitið av teimum kanningunum var, at olja lak upp úr undirgrundini nógva staðni á føroyaleiðunum, og í fleiri plássum var talan um rættiliga stór øki við oljulekum úr undirgrundini

-Vit fara at kanna onnur pláss enn Geoscience gjørdi og vit hava eisini aðra og betri útgerð sigur Caroleen Moir við Sosialin

Tey hava serútgerð til at kunna kortleggja oljulekar, sum síggjast á havyvirflatuni. Eisini hava tey útgerð, sum kannar fellur og onnur jarðfrøðilig fyribrigdi, sum hava týdning fyri eina komandi oljuleiting

Uppá fyrispurning um hesin kanningarhátturin í veruleikanum kann brúkast til nakað ítøkiligt sigur Caroleen Moir, at hann hevur víst seg at vera sera hentur aðrastaðni í verðini. M.a. í Írlandi. Tá 17 oljufeløg herfyri buðu uppá teigar í írskum øki valdu tey at brúka oljulekakortini hjá Oilseare

Talan er um eina kanning, sum fyritøkan lutvíst sjálv hevur tikið stig til. Men tað eru eisini oljufeløg, sum hava heitt á felagið um at gera hesa kanningina, nú tað nærkast einum útbjóðingarumfari í føroyskum øki.

Caroleen Moir skal sjálvandi royna at marknaðarføra sína vøru so gott til her, men hon bedýrar, at hesin kanningarhátturin kann hava stóran týdning fyri eina komandi oljuleiting

-Vit kunnu siga innan fyri fáar metrar, hvar oljan kemur upp úr undirgrundini, og hvar oljufeløgini tí møguliga eiga at leita um ikki so neyvt sum at seta borin í. Hon heldur eisini, at slíkir oljulekar kunnu siga nógv um møguleikarnar at finna olju, og eftir tí, sum hevur hoyrt og sæð um leitingina við Føroyar, so heldur hon góðar møguleikar vera fyri at finna olju her

NATEN 1-2-3

At vera á toppinum, kann taka orkuna. Nýggjastu kanningarúrslit vísa, at evni frá býflugunum, er eitt hitt besta fyri fólk, at endurnýggja immunverjuna, minkar um ellisteknin og strongd. Eitt evni í NATEN® 1-2-3, inniheldur millum annað Panthothene og Tryptophan, vitaminir A, allar B, C og E, mineralir og aminosýrur

Til 1 mánað kr. 249,-

Ringið og vit senda í postinum

NATEN®
Søla

[illegible] 1 • Tlf. 18649

Røktarheimið og Sambýlini í Sandoynni

Fólk, ið ætla sær at søkja um bú- ella umlættingarpláss á Røktarheiminum á Sandi og/ella á Sambýlini í Skopun og Skálavík, fáa umsóknarblað við at venda sær til:

Røktarheimið á Sandi
FR 210 Tórshavn
Tlf. 61749

Suðuroyar Sjúkrahús
800 Tvøroyri

Søkt verður eftir avloysara fyri økonomaassistent í tíðarskeiðnum 1. desember '97 til 30. apríl '98.

Løn sambært sáttmála millum Økonomafelag Føroya og Føroya Landsstýri.

Nærri fæst at vita viðvíkjandi starvinum við at venda sær til økonomuna tlf. 71133 lokal 126.

Umsókn við avriti av prógvum v.m. verða at senda til: Umsjónarmannin, Suðuroyar Sjúkrahús, Postboks 51, 800 Tvøroyri innan 15. november 1997.